# Grannarnir eru í øðini

**Grannarnir í Sornhúsgøtu hava sent Býráðnum mótmælisskriv og savnað undirskriftir at mótmæla ætlanina hjá Farex-monnunum, um at byggja ein bygning í fimm hæddum upp fyri hús teirra.**

BÚSTAÐUR
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*



*Raðhúsini í Sodnhúsgøtu missa stóran part av útsýninum, um ein bygningur í fimm hæddum kemur upp fyri*


Vit mótmæla tí ætlanini um at byggja nevnda íbúðarblokk við R.C. Effersøesgøtu og krevja at ætlanin verður steðgað.

Hinvegin ynskja vit, at Býráðið tekur stig til at friða tey bæði gomu læknahúsini við tilhoyrandi urtagørðum, sum tær perlur í býarmyndini, sum hesi bæði hús eru í dag. Hetta til gagn fyri býarmynduna og íbúgvarnar í Tórshavn.

Grannarnir eru ikki sørt skelkaðir av ætlanunum hjá Farex monnunum, Róa Egholm, Kaj Leo Johannesen og Kára Danielsen, um at byggja ein bygning í fimm hæddum framman fyri hús teirra.

- Tað var eitt chok hjá okkum at finna útav, at vit nú eru í vanda fyri at missa alt útsýnið, ið júst hevur verið ein av stóru fyrimunurin við at búgva her, sigur Maud Vang Hansen, sum er millum íbúgvarnar, ið hevur brúkt nógvan pening til at flyta bæði stovu og køk upp í erva, so tey fáa sum best burtur úr útsýninum.

## Sera vónbrotin

Helga Djuholm hevur búð í raðhúsunum í tríati ár:

- Haldi et tað er einki minni enn forkastiligt, at teir ongantíð hava sett seg í samband við okkum og kunnað okkum um verkætlanina, og tað er ikki minst tað, sum er so særandi í hesum málinum, sigur Helga Djurholm, sum býr í triðja-innasta raðhúsinum. Hon vísir á, at tey hava stóra gleði av urtagarðinum framman fyri húsinum og at sita og hugna sær á altanini, tá veðrið er gott.

- Alt hetta missa vit, um ein so høgur bygningur kemur upp fyri, staðfestir hon.

## Fylgja býarlívinum

- Fólk ána ikki, at vit hava so gott útsýni her, men veruleikin er tann, at vit síggja næstan allan býin hiðani. Vit kunnu fylgja við í býarlívinum - tá býurin vaknar, fólk sum eru á veg í kirkju og fólk, sum fara heim úr Kagganum. Og so er ljósið nakað av tí besta við at búgva her, sigur Maud Vang Hansen, sum tó ikki roknar við, at Býráðið fer at geva byggiloyvi.

- Eg slapp enn ikki at byggja ein hálvan metur upp í altanina, tí tað var brot á byggisamtyktina. So tað skuldi verið løgið, um teir sleppa at byggja upp fyri øll húsini her, sigur altanina út ein hálvan metur, sigur Katrin Mikkelsen, sum ikki er so bjartskygd sum Maud.

- Eg rokni við, at teir fáa loyvi til tað, tí tað er ikki nakað pláss eftir í býnum og tí verður heldur bygt upp eftir, sigur hon.

## Tað verður bølamyrkt

Byggiharrarnir hava kunnað Býráðið um ætlanina, men enn hevur málið ikki verið til viðgerðar. Tá grannarnir vórðu kunnaðir um hetta, tóku teir stig til at senda býráðnum eitt mótmælisskriv. Tilsamans hava 9 húski í raðnum undirskrivað mótmælið.

- Teir kundu um ikki annað bjóða okkum eini nýggj hús, tí okkara verða onki verd, um ein so høgur bygningur kemur at standa beint upp ímóti okkara, sigur Helga Djurholm.

Katrin Mikkelsen, sum hevur búð í næstinnasta húsinum í 5 ár, skoytir uppí, at tað verður bølamyrkt inni um dagin, um verkætlanin verður góðkend av býráðnum og húsini koma upp at standa, sum byggiharrarnir hava ætlanir um.

## Óhóskandi bunkari

Í mótmælisskrivinum, sum grannarnir sendu býráðnum 23. oktober, verður millum annað sagt, at byggingin fellur ikki inn í lendið og grannalagið.

- Hóast arkitekturin aftanfyri íbúðarblokkætlanina hevði sum uppgávu at gera sniðið soleiðis, at bygningurin hóskar til verandi umhvørvi, er tað okkum eyðsæð, at bygningurin als ikki hóskar inn í verandi Havnamynd. Til tess er bygningurin alt ov tungur og stórur. Vit halda harafturat at tað bunkaralíknandi sniðið als ikki hóskar saman við verandi húsum í økinum, verður sagt í mótmælinum.

## Friða heldur húsini

Grannarnir siga eisini, at teir halda, at verandi doktararahús eru perlur í býarmynduni, sum Býráðið átti at vart og kanska enntá friða.

- Henda framúrskarandi býarmynd eigur ikki at verða ofrað í reinari peningaspekulatión, sum íbúðarblokkurin í veruleikanum er.

## Ferðsluruðuleiki

Í mótmælinum siga grannarnir eisini, at byggingin elvir til størri ferðslutrupulleikar, tí íbúðarblokkurin skal hava inn- og útkoyring fra Gripsvegnum.

- Vit eru greið yvir ferðslutrupulleikarnar við Gripsvegin, partvís tørvandi parkeringspláss í ólukkumáta í økinum og partvís torføru út-/innkoyringarnar frá síðugøtunum Sornhúsgøtu, Fjósagøtu ofl... Vit síggja fyri okkum eitt eljustríð um parkeringspláss, sum avgjørt ikki verður grannalagnum at gagni – heldur tvørturímóti.

## Byggisamtyktunum broytast

- Vit síggja longu nú, at íbúðarblokkaætlanin als ikki kemur at lúka byggisamtyktirnar. Skal ætlanin realiserast sambært umsóknini, verður Býráðið at broyta serstøku byggisamtyktina fyri øki ella geva loyvi til munandi frávík fra henni, og hesum mótmæla vit sum búgva næst, stendur eisini í mótmælisskrivinum.

## Tekur útsýnið

Íbúgvarnir siga eisini í skrivinum, at íbúðarblokkurin verður bygdur so langt niðan móti sornhúsgrannunum sum gjørligt.

- Hetta saman við tí hædd blokkurin væntast at fáa, kemur at taka frálíka útsýnið, og enntá dagsljósið, frá grannunum, sum jú er ein týdningarmikil trivnaðarparametur hjá íbúgvunum. Tað er alt annað enn huganligt at fáa ein betongvegg at hyggja at í staðin fyri dagsins útsýni. Tað er heldur ongin loyna, at fíggjarliga virði av húsunum í Sornhúsgøtu í stóran mun er treytað av frálíka útsýninum.

## Friðið heldur

Og sagt verður víðari, at tey eru sannførd um, at nevndi íbúðarblokkur verður ein byrða fyri trivnaðin í grannalagnum og harumframt kemur blokkurin at skemma umhvørvi munandi har á leið. Sostatt er hatta ein verkætlan, sum er heilt burturvið, stendur at lesa í mótmælinum, sum endar við einari áheitan, ið er skrivað við feitum:

- Vit mótmæla ætlanini um at byggja nevnda íbúðarblokk við R.C. Effersøesgøtu og krevja at ætlanin verður steðgað.

Hinvegin ynskja vit, at Býráðið tekur stig til at friða tey bæði gomlu læknahúsini við tilhoyrandi urtagørðum, sum tær perlur í býarmyndini, sum hesi bæði hús eru í dag. Hetta til gagn fyri býarmynduna og íbúgvarnar í Tórshavn, verður sagt at enda.



*Tær tríggjar: Helga Djurholm, Katrin Mikkelsen og Maud Vang Hansen, eru millum íbúgvarnar í Sornhúsgøtu, sum fara at kenna sviðan, um eini stór íbúðarhús verða bygt upp fyri raðhús teirra.*

## Ynskja brúkiligan dialog

Mótmælisskrivið sum íbúgvarnir í Sornhúsgøtu hava sent býráðnum, hevur Rói Egholm ikki sæð. Men eins og tey í Sornhúsgøtu bíða eftir svari, so bíðar Rói Egholm eisini eftir svari frá býráðnum.

– Vit bíða nú eftir býráðnum fyri at vita hvar tey eru í hesum her, og hvat tey vilja hava, sigur Rói Egholm.

Tá tað er komið upp á pláss, so ætla Rói Egholm og teir at taka ein kunnandi fund við tey í Sornhúsgøtu um verkætlanina, soleiðis at teir kunnu greiða frá hvat verkætlanin inniber.

– Vit ynskja ein brúkiligan dialog við íbúgvarnar har, og ikki at tveita við runubløkum, sigur Rói Egholm.

Rói Egholm ásannar tó, at hetta málið er eitt tvíeggjað svør, tí eitt tilboð til nøkur gongur út yvir onnur.

– Men ynskja vit eitt tilboð mitt í býnum til tey eldru, so er tað her tað órógvar minst, sigur Rói Egholm.

-rwd